# Oyndfirðingar stríðast við skuld

**Vit eru kúgað av skuld, og hana tekur eingin frá okkum. Men vit royna at knógva undan. Alt, sum gjørt verður, verður goldið so hvørt, tí vit ræðast lán, sigur Árni Joensen, borgarstjóri í Oyndarfirði**

KOMMUNUMÁL
*Edvard Joensen*



*– Oyndarfjarðar Kommuna er kúgað av skuld. Men vit eru á veg upp undan aftur, og tað verður leingi, áðrenn nakað kommunalt lán aftur verður tikið í Oyndarfirði, sigur Árni Joensen, borgarstjóri í Oyndarfjarðar Kommunu*

**Oyndarfirði:** Oyndfirðingar stríðast ein harðan dyst móti gamlari kommunuskuld. Kommunala skuldin er umleið hálvtriðja álíkning, sigur Árni Joensen, borgarrstjóri í Oyndarfjarðar Kommunu.

Kommunalu arbeiðini, sum gjørd verða í Oyndarfirði komandi árini, verða øll slík, sum neyðugt er at gera. Viðlíkahald, sum ikki slepst uttan um, sigur hann.

Men hann hevur vónir um, at tað fer at verða liviligari í bygdini, tí sum er verður goldið niður av skuldini. Eisini er hann sannførdur um, at skattaprosentið má lækkast nakað, eins og hann heldur, at barnafrádrátturin væl kundi verið hægri uttan tó at lova, at so verður.

## Ymisk virksemi

Hóast stóru skuldina, er ymiskt kommunal virksemi í Oyndarfjarðar Kommunu. Tað er spjatt, sigur borgarstjórin, og verður í fleiri førum gjørt í smáum. Men slíkar eru treytirnar, sigur hann.

Samlaða skattainntøkan í Oyndarfjarðar Kommunu liggur um góðar fýra milliónur krónur, meðan skuldin er 1,4 millión.

– Tað sigur seg sjálvt, sigur Árni Joensen, at tá tú skal gjalda ein fjórðing av so lítlari inntøku fyri skuld, verður lítið eftir at gera annað fyri.

Men treyðugt so. Ruskpláss verður gjørt, Kloakkir verða lagdar, havnin verður reinsað, vegir asfalteraðir, brandstøð og brandlið hava oyndfirðingar fingið, útstykking er á veg, eins og skúlin skal byggjast út.

– Hygg, hatta ljóðar øgiliga nógv. Men sannleikin er, at vit taka tað í smáum, sigur borgarstjórin.

Eins og so nógva aðrastaðni er eisini útstykking á veg í Oyndarfirði, greiðir borgarstjórin frá. Ein útstykking við sjey grundstykkjum. Eitt er longu selt, meðan eitt annað er umbiðið.

## Skúlarnir

Tveir skúlar eru í Oyndarfirði, og báðir standa fyri umvælingum og útbygging.

Nú er tað sjálvandi ikki so, at báðir verða brúktir til vanliga skúlagongd. Gamli Skúli, tey kalla, hýsir í løtuni læknaviðtaluhølunum hjá kommununi.

Men haðani skal læknin helst flyta nakað skjótt í onnur høli í nýggja skúlanum, sigur Árni Joensen.

Grundin er, at Gamli Skúli er friðaður, og gjørt er av at seta hann í sama stand, hann var í, tá hann varð bygdur í 1876.

Millum annað skal skúlastovan gerast aftur, sum hon var var, og flag leggjast aftur á takið.

Eisini nýggi skúlin skal hava ábøtur. Byggjast skal upp í hann, greiðir borgarstjórin frá.

Tað arbeiðið, vónar hann, kann farast undir einaferð eftir summarfrítíðina.

Annars verður kloakkskipanin gjørd av nýggjum í Oyndarfiðri, eins og umhvørvisplássið, sum ruskøkið nú verður nevnt, eisini skal gerast av nýggjum.

Tað varð planerað í fjør. Dekkið verður stoypt í ár. Og so verður tað helst gjørt liðugt komandi ár.

– Soleiðis arbeiða vit, tí tað eru vit noyddir til, sigur Árni Joensen borgastjóri í Oyndarfjarðar Kommunu, sum soleiðis vil lýsa fíggjarligu støðuna, sum hon er.

Vegirnir í bygdini skulu eisini asfalterast, sigur hann og leggur afturat, at tað treingir eisini til.

Oyndfirðingar hava fingið brandatøð og sløkkiútgerð. Teir hava so lænt ein brandjeep, sum borgarstjórin tekur til, frá Fuglafjarðar Kommunu.

Árni Joensen fegnast um tað góða samstarvið, ið er við Fuglafjarðar Kommunu, sum letur oyndfirðingum bæði skrivarahjálp, eins og góða hjálp á tekniska økinum.

## Havnin

Beinleiðis grundin til stóru kommunuskuldina í Oyndarfirði eru havnin og saltfiskahúsið hjá kommununi, sigur borgarstjórin.

Oyndarfjørður hevur góða havn, og kommunan eigur eitt saltfiskahús á havnarlagnum. Húsið verður í dag leigað út, men best hevði verið at fingið tað selt, um tað hevði borið til, sigur Árni Joensen.

Í dag er steindeytt á havnarlagnum, sigur hann. Grundin er, at sóttreinsað er eftir ILA sjúkuna, sum var í alivnnuni á firðinum, og økið liggur í karantenu í eitt hálvt ár. So virksemi verður einki fyrr enn í fyrsta lagi í summar, væntar borgarstjórin.

Í sambandi við ILA sjúkuna er øll havnin reinsað, greiðir hann frá. Alt, sum á botni lá, er grabbað upp, eins og fortøjningsketurnar og botnketan eru tiknar upp og skiftar út.

## Sosialurin vælkomin

Eins og aðrir borgarstjórar í Eysturoynni, Sosialurin hevur tosað við, fegnast Árni Joensen um, at Sosialurin letur upp redaktión í Eysturoynni.

– Tað haldi eg nógv um, og eg eri sannførdur um, at tað fer at gagna bæði økinum og blaðnum.

– Vit, sum búgva í økinum, fara ivaleyst at kenna tað sum ein part av økinum, og fara uttan iva at støkka inn á gólvið soleiðis av og á, tá vit hava okkurt upp á hjarta, væntar borgarstjórin í Oyndarfirði, sum ynskir Sosialinum vælkomnum til teirra.



*Havnarlagið gjørdist dýrt fyri Oyndarfjarðar Kommunu, sum rindar umleið ein fjórðin av skattainntøkuni til rentur og avdráttir.*
*Í løtuni liggur alt virksemi á havnarlagnum stilt orsakað av ILA sjúku*



# Eysturoyingar vilja hava arbeiðsfólk betur tryggjað



*– Tað tykist sum um tryggingin altíð klárar at fáa tað til, at tað eru arbeiðsfólk sjálvi, ið hava skyldina av, at tey koma til skaða, men hetta er eitt mál, sum vit vilja hava Føroya Arbeiðarafelag at gera nakað við, sigur Karla Einarsson, formaður í arbeiðarafelagnum Hæddini í Runavík*

**Arbeiðarafeløgini í Eysturoynni vilja hava tryggingarviðurskiftini hjá arbeiðsfólki viðgjørd á aðalfundi hjá Føroya Arbeiðarafelag**

TRYGGING
*Áki Bertholdsen*

– Tá ið arbeiðsfólk koma til skaða, er tað altíð ógvuliga trupult at fáa nakað frá tryggingini.

Men tað vilja arbeiðarafeløgini í Eysturoynni nú hava skil á

Karla Einarsson, formaður í Arbeiðarafelagnum Hæddini sigur, at arbeiðarafeløgini í Eysturoynni eru so ónøgd við tryggingarviðurskiftini hjá arbeiðsfólki, at tey ætla at reisa málið á aðalfundi hjá Føroya Arbeiðarafelag, sum verður 15.ø og 15. mars.

Uppundiur hvønn aðalfund í Føroya Arbeiðarafelag, plaga øll arbeiðarafeløgini í Eysturoynni hava felags fund at tosa um viðurskiftini og fyri at vita, um tað eru mál, sum tey kunnu leggja fyri fundin í felag.

Í hesum sambandi var fundur í Gøtu mikukvøldið og har vóru tryggingarviðurskiftini høvuðsmálið.

Tey siga, at hvørja ferð, onkur meiðslar seg, er tryggingin so trupul at koma í holt við, at tað er ótolandi.

– Tað vísir seg, at hvørja ferð, tað er brúk fyri tryggingini, fæst onku burturúr henni, tí hvørja ferð er tað okkurt, ið ikki er, sum tað skal og sum ger, at tann, sum kemur til skaða, dettur niður ímillum.

– Tað vísir seg, at tryggingin alla tíðina klárar at venda málið ímóti tí, sum kemur til skaða, og at tað er hann sjálvur, sum hevur skyldina av óhappinum. Altíð eru tað lógfrøingar, sum koma upp í málið og teirra niðurstøða er altíð til frama fyri tryggingina, soleiðis tykist tað í øllum førum, sigur formaðurin í Hæddini.

– Viðhvørt eru tað eitt orð, ella ein setningur í eini langari frágreiðing, sum tryggingin hongir seg í og tað tykist sum um at fremsta endamál hennara er at royna at sleppa undan at gjalda trygging.

Karla Einarsson sigur, at hetta er eitt mál, sum arbeiðarafeløgini í Eysturoy eru samd um at leggja fyri aðalfundin í FA.

Enn hava tey onki boð uppá, hvat kann gerast.

– Vit kunnu kanska ikki ávirka tryggingina, men vit vilja í øllum førum haav spurningin til umrøðu á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag fyri at vita, um FA kann arbeiða við málinum, onkusvegna.

## Stóran inntøkumiss

Annars umrøddi fundurin eisini viðurskiftini hjá teimum, sum reinsa tunlarnar hjá Landsverkfrøðinginum.

– So vitt,vit hava fingið upplúst, standast nógvir skaðar av hesum arbeiði, kroystir fingrar, hendur, skaða í ryggir o.s.fr..

– Men tá er arbeiðsgevarin bara skyldugur at endurrinda arbeiðsmanninum 80% í endurgjaldi av eini vanligari dagløn.

Hetta halda feløgini í Eysturoy kann ikki góðtakast, tí hetta er arbeiði, sum fer fram um næturnar, tá ið arbeiðsfólk fáa yvirtíð.

Feløgini í Eysturoy halda avgjørt, at arbeiðarin eigur at fáa endurgjald eftir tí veruligi tímaløni, tvs. við yvirtíð og viðbótum og ikki bara eftir eini vanligari dagløn, su mteir fáa nú.

# Mekanik og FJM eru grannar

**Men tað verður ikki leingi aftrat, tí FJM hevur keypt nýggjan og stóran bygning á Rytuvíkshálsi**

*Vilmund Jacobsen*

Á syðra havnaøkinum í Runavík er stórt virksemi. Har eru tveir maskinverkstaðir, Mekanik og FJM, har er AWI Boats, sum byggir bátar, bæði til heimamarknaðin og útlendska marknaðin, og har er VVS-virkið hjá Zachariasi Leitisstein. Harumframt er Højgaards Timburhandil og Eysturoyar Heilsøla. Somuleiðis er sandsøla á økinum.

Meðan Mekanik serliga tekur sær av maskinumvælingum, íseting av maskinum og øðrum viðlíkahaldi og nýgerð umborð á skipum, hevur FJM serliga lagt seg eftir at arbeiða við rustfríum stáli.

Mekanik og FJM eru so gott sum grannar; har er bert eitt stórt hanagleiv ímillum bygningarnar.

Men tað verður ikki leingi aftrat, at FJM verður verandi við Fjørðuvegin, tífelagið hevur keypt ein nýggjan og stóran bygning á ídnaðarøkinum á Rytuvíkshálsi.

Hetta er ein bygningur, sum Símun Mittún hevur latið byggja og nú hevur seltFJM. Yvirtøkudagurin er 1. mars.



*Nýggi bygningurin hjá FJM á Rytuvíkshálsi*

So, nú fer FJM í smáum at flyta sítt virksemi yvir í bygningin, sum er nógv størri enn tann verandi.

Gamli bygningurin í Runavík er 510 fermetrar, meðan tann nýggi er 900 fermetrar og hevur møguleikar til skrivstovur í ovari hæddini, tí bygningurin er hægri enn tann gamli. Nakað av lofti er gjørt í nýgga bygninginum, men hann verður ikki yvirtikin við skrivstovum á loftinum. Tó kann hann takast í nýtslu beinanvegin, tí skrivstovur eru eisini í niðaru hæddini.

Frithleif Olsen, sum eigur og rekur FJM, sigur, at ivasamt er, nær alt virksemið, sum nú er í bygninginum við Fjørðuvegin, verður flutt í nýggju hølini, tí fyritøkan hevur so ómetaliga nógv at gera í løtuni.

- Men hetta verður gjørt so við og við, sigur hann.

FJM er nú liðugt við arbeiði, teir hava gjørt umborð á Ennibergi. Meginparturin av verksmiðjudekkinum er gjørt av nýggjum, og nýggj tól og maskinur eru sett upp.

Tað næsta stóra arbeiði hjá FJM er umborð á rækjuskipinum, Ocean Castle, har teir eisini skulu broyta verksmiðjuna umborð, so hon verður meira rationell.

- Vit vænta, at meginparturin av hesum arbeiði fer fram, meðan skipið liggurí Saltangará, sigur Frithleif Olsen.

Men FJM hevur eisini onnur jørn í eldinum. Teir skulu t.d. niður til Spaniu at seta upp arbeiðsdekkini umborð á nýggju trolarunum, sum P/F Beta byggir har niðri. Hetta arbeiði verður gjørt til í Føroyum; síðan fara fólk frá niður til Spaniu at seta upp.

Á FJM eru 35 væl kvalifiserað fólk til arbeiðis hvønn dag, og tey hava ríkiligt at takast við.

Fyritøkan umhugsar at selja verandi bygning við Fjørðuvegin, tá ið virksemið í Runavík er flutt yvir í nýggja bygningin á Rytuvíkshálsi. FJM arbeiðir mest við rustfríum stáli og hevur Føroya størstu goymslu av hesum. Málið er at veita eina góða og skjóta tænastu í tøttum samstarvi við viðskiftafólk hjá fyritøkuni.

Hetta er ein privat fyritøka, og maðurin aftanfyri er Frithleif Olsen.

FJM er stovnað í 1986 og hevur verið í støðugum vøkstri. Við hollum royndum innan menning og framleiðslu av matvøruframleiðslutólum, er fyritøkan før fyri at veita heildarloysnir, líka frá teknibórði til liðug framleiðslutól.




*Og her síggja vit maskinverkstaðin, Mekanik, sum vit fara at gera meira burtur úr í blaðnum í morgin*